*Ráð, ráðgevandi verkfrøðingar, Grønlandsvegur 38, 100 Tórshavn*
*Tel 610061 - 225859 - email: rad@rad.fo*

| | |
|---|---|
| **Søluvirðið av høllini:** | **Kr** |
| **Søluvirðið av arbeiðshøllini verður mett til:** | **520.000** |
| **Nývirðið verður mett til:** | **1.940.000** |

Tilskilast kann, at søluvirðið er at skilja sum restvirðið.
Roknað er ikki við innbúgvi.
Fyrivarni verður tikið fyri skjúldum manglum.
Tilskilast kann, at hetta er ein virðismeting og ikki ein tilstandsrapportur.

Vinarligast
Sp/f Ráð

Kári Lamhauge, verkfr.

# Virðismeting av ognum á Glyvursnesi

## Í samabandi við golfvøll




Ognari: Búnaðarstovan
Festari: Sjúrður Paturson

Biðið um metingina: Búnaðarstovan

**Alment**

Metingin er bygd upp soleiðis, at verandi seyðahús/hoyggjhús og hegn eru virðismett í tí standi tey eru í, meðan vegur og planering eru mett at hava sama virði sum nývirði.

Somuleiðis er ein meting gjørd av, hvat kostnaðurin er, um bóndin skal flyta, og fáa samsvarandi umstøður á øðrum stað.

Vit hava verið á staðnum, saman við Sjúrði Patursyni, har Sjúrur greiddi frá, hvar ætlanin er at flyta. Sjúrður hevur síðani góðkent staðseting og økið til innhegning, men metti tó, at hegnlongdin eigur at vera nakað større, tí trupult er at hegna í beinari linju.

Sjúrður hevur boða frá, at maskinhøllin nýtist ikki at verða størri enn 10 x 15 m

Nýggja øki er nakað størri, og økið til at velta jørð er góðar tvær ferðir so stórt, orsakað av at tað liggur hægri.

Metingin er útgreinað í hjáløgdu skjølum "Virðismeting av arbeiðshøll í grótbrotinum", "Virðismeting av seyðahúsi á Glyvursnesi" og "Virðismeting av vegi og hegni"

Allar upphæddir eru uttan MVG

**Meting av virði av verðandi bygningum og hegni**

| | | |
|---|---|---|
| Seyðahús: | kr. | 2.460.000,- |
| Maskinhøll: | kr. | 520.000,- |
| Byggibúning: | kr. | 300.000,- |
| Hegn: | kr. | 227.000,- |
| Samlað: | kr. | 3.507.000,- |

**Meting av kostnaði av flyting**

| | | |
|---|---|---|
| Seyðahús: | kr. | 3.100.000,- |
| Maskinhøll: | kr. | 1.940.000,- |
| Byggibúning: | kr. | 300.000,- |
| Hegn: | kr. | 384.000,- |
| Samlað: | kr. | 5.724.000,- |
| Vegur og byggibúning: | kr. | 2.300.000,- |
| Í alt | kr. | 8.024.000,- |

Við minni maskinhøll, verður nývirðið í alt kr. 6.812.269,-

Virðismeting av vegi og hegni

Ognari: Búnaðarstovan

Festari: Sjúrður Paturson




Innhegning, Longd uml. 1940 m
Innhegning, Flata uml. 500.000 m2
© kortal.fo
Scale = 1 : 13



Staðseting av seyðahúsi
Staðseting av maskinhøll
Møgulig linjuføring, longd uml. 1500m
© kortal.fo
Scale = 1 : 13



Innhegning, Longd uml. 2300 m
Hegn at skilja sundur, Longd uml. 550 m
Heg, dyrkað, Longd uml. 330 m
Innhegning, Flata uml. 520.000 m2
Innhegning, dyrka lendi uml. 35.000 m2
Scale = 1

**Kostnaðarmeting:**

**Vegur:** Roknað er við 5m breiðum uppdyrkingarvegi, við ongum asfalti. Vegurin hevur í minsta lagi 500mm frá yvirkanti niður á hellu. Vegurin fylgir lendinum, uttan tó at nøkur brekka er ov brøtt.

Longd: 1500 m

Eindarkostnaður: 1.533 kr/m

Samlaður kostnaður: 2.300 tús.

**Planera øki:** Roknað er við, at økið er uml. dupult so stórt sum Seyða/hoygghús og maskinstøð. Roknað er við, at planeringin er 1m tjúkk í meðal.

Flata: 1.333 m2

Eindarkostnaður: 225 kr/m2

Samlaður kostnaður: 300 tús.

**Hegn uttanum:** Longd: 2300 m

Eindarkostnaður: 120 kr/m

Samlaður kostnaður: 276 tús.

**Hegn at skilja :** Longd: 550 m

Eindarkostnaður: 120 kr/m

Samlaður kostnaður: 66 tús.

**Hegn dyrkað :** Longd: 350 m

Eindarkostnaður: 120 kr/m

Samlaður kostnaður: 42 tús.

**Rest virði av**

**verðandi hegni:** Rokna er við, at hegn til at skilga og hegn til dyrkað lendi er áleið somu longd sum til nýggja øki, meðan innhegningin er máld til 1940 m. Mett er at restvirði er 66% av nývirði.

**Hegn uttanum:** Longd: 1940 m

Eindarkostnaður: 80 kr/m

Samlaður kostnaður: 155 tús.

**Hegn at skilja :** Longd: 550 m

Eindarkostnaður: 80 kr/m

Samlaður kostnaður: 44 tús.

**Hegn dyrkað :** Longd: 350 m

Eindarkostnaður: 80 kr/m

Samlaður kostnaður: 28 tús.

*Ráð, ráðgevandi verkfrøðingar, Grønlandsvegur 38, 100 Tórshavn*
*Tel 610061 - 225859 - email: rad@rad.fo*

Tann 16.11.2013

**Búnaðarstovan**
**Frammi í Dali 166**
**410 Kollafjørður**

**Viðv.: Virðismeting av verandi seyðhúsi á Glyvursnesi.**
**Ognari: Búnaðarstovan. Festari: Sjúrður Paturson, í Lágabø 6, 175 Kirkjubø.**

## Nota um seyðhúsið:

Sethúsið er bygt í umleið 1990.
1. Hædd. Har eru tvey stór rúm, har annað er kjallari og hitt er køstur.
2. Hædd. Her er innrættað stova, køkur og toilett og venda hesi høli oman móti Nólsoyarfirði. Herumframt er stórt seyðhús og stórt hoyggjhús.
Grundin er stoypt, meðan 2 hædd er úr timburkonstruktión.
Vindeyguni í kjallaranum eru úr timbri, restar málaraviðgerð.
Portur. 2 stk timburportur eru í kjallarahæddini og tey resta málaraviðgerð.
Vindeyguni í 2 hædd. Resta málaraviðgerð og nakað av umvælingum.
Klædningur í 2 hædd er úr timbri og restar málaraviðgerð. Takúthang restar somuleiðis máling.
Úthurð í 2 hædd restar umvæling og máling.
Portur í 2 hædd er úr timbri og restar máling.
Útveggir í 2 hædd eru lættir og klæddir innan við 12 mm krossviði, sum er málað við hvítum liti.
Útveggirnir í hoyggjhúsinum eru ikki klæddir innan.
Tekjan er bygd upp við sperrum úr 4"x8" pr 80 cm, tróður úr 3 mm maronite, og aliminiumtekju.
Tekjan í hoyggjhúsi hevur onki tróður.
Gólv í seyðhúsi er úr timbri, klætt við stálrist. Restin av gólvunum eru úr timbri við gólvkrossviðaplátum. Gólvið í kjallaranum er úr betongi.
Køkur, stova og toilett eru innrættaði rúm við tapeti/máling/lutvís træklædningi. Loft úr træpaneli og gólvklæðing úr linoleumi og lutvis parkerttbelegningi.
Bjálving. Ongin bjálving er í bygninginum.
El-innstallasjón er vanlig innstallasjón.
Oljufýring og ketil eru av eldri dato.
Septiktangi er til ognina.
Fráleyp frá køsti rennir í áir og gil.
Vatninnføring úr plasti. Privatur tangi.

## Grundarlag fyri meting:

Sigast kann um seyðhúsið, at tað er í rímiliga góðum standi. Støddin av bygninginum er hóskandi til seyðahaldið, sum garðurin nú hevur. Støddin útvendugt mát er 2x384 m2.
Til-og frákoyringarviðurskifti eru góð
Køsturin verður nýttur nýttur sum gjødningur
Vanliga verður flett í kjallaranum.
Útsýnið er sera gott út yvir Nólsoyarfjørð og lutvís Havnina.

| | |
|---|---|
| **Søluvirðið:** | **Kr** |
| **Søluvirðið av seyðhúsinum verður mett til:** | **2.460.000** |
| **Nývirðið verður mett til:** | **3.100.000** |

Tilskilast kann, at søluvirðið er at skilja sum restvirðið.
Roknað er ikki við innbúgvi.
Fyrivarni verður tikið fyri skjúldum manglum.
Tilskilast kann, at hetta er ein virðismeting og ikki ein tilstandsrapportur.

Vinarligast
Sp/f Ráð

Kári Lamhauge, verkfr.

*Ráð, ráðgevandi verkfrøðingar, Grønlandsvegur 38, 100 Tórshavn*
*Tel 610061 - 225859 - email: rad@rad.fo*

Tann 19.11.2013

**Búnaðarstovan**
**Frammi í Dali 166**
**410 Kollafjørður**

**Viðv.: Virðismeting av verandi arbeiðshøll í grótbrotinum á Glyvursnesi.**
**Ognari: Búnaðarstovan. Festari Sjúrður Paturson, á Lágabø 6, 175 Kirkjubøur.**

## Nota um høllina:

Høllin er upprunaliga arbeiðshøll hjá E. Pihl og Søn og er bygd í umleið 1998. Høllin er til støddar uml. 25,5 x 11,1 m2 og er til hæddar í miðjuni 6,53 m. Talan er um eina stóra høll við avrundaðari tekju. Talan er um eitt stórt høli við lítlum formansskúri í innara horni. Ein kontainari uttandura er somuleiðis bundin til høllina
Grundin er stoyptur sokkul 0,3x0,3 m2 stoypt saman við gólvinum.
Gólvið í høllini er úr betongi og er stór rist í gólvinum, sum er íbundin oljuútskiljara.
Klædningurin er úr rukkuplátum, sum eru galvaniseraðar. Nógvur rustur er at síggja. Annars er talan um eina stálhøll, har stálbogarnir eru úr rørformaðum bogum, sum innan eru styrktir við. i-profili. Innan dura er høllin klødd við krossviðaplátu 1,2 m upp frá gólvinum.
Eitt stórt aluminiumsportur er í skjøldrinum. Portrið er lappa aftur, tí tað er blást niður av stormi.
Portrið er ónýtiligt, sum tað nú stendur.
Ein stálúthurð er í skjøldrinum.
Sum vindeyguni eru nýttar klárar bylgjuplátur í tekjukonstruktiónini.

Bjálving. Høllin er bjálvað við 10 cm steinull. Líkt er til at kontainarin uttan fyri eisini er bjálvaður.
Innan fyri bjálvingina er klætt við plastikfolie.
El-innstallasjón er í høllini og somuleiðis til størri amboð.
Hiti er frá el-blásarum. Oljutangi er á staðnum. Hevur møguliga verður nýttur til annað endamál.
Septiktangi er á staðnum, men er ikki knýttur til høllina..
Trýstluftanlegg er til høllina.
Vatninnføring úr plasti. Privatur tangi.

## Grundarlag fyri meting:

Sigast kann um Arbeiðshøllina, at hon er í ringum standi. Høllin sær eisini slitin út bæði uttan- og innandura. Høllin hevur verið brúkt aðrastaðni, áðrenn hon var bygd upp aftur í grótbrotinum.
Støddin av høllini er 283 m2 útvendugt. Kontainarin er til støddar 15 m2 útvendigt.
Til-og frákoyringarviðurskifti eru góð
Høllin er fjald inni í grótbrotinum og hevur bert útsýni niðaneftir.
Hvør vítt høllin kann takast niður og seta upp aftur á øðrum stað halda vit, at hetta ikki loysir seg.